# Fosturtøka undir skeivum fortreytum

**Carl Sukkot er leiðari á eini viðgerarstovu í Keypmannahavn, ið hjálpir kvinnum at koma fyri seg aftur, eftir at tær hava fingið fosturtøku framda. Hann sigur, at fosturtøkuskipanin, sum er galdandi, er ikki frí, hóast hon er ókeypis. – Tað koma so ómetaliga nógvar avleiðingar av fosturtøkum, sum eingin snakkar um, og sum merkja hesar kvinnurnar í ógvuliga stóran mun, sigur hann**

FOSTURTØKA
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*



*Carl og Elisabeth Sukkot hava í fleiri ár starvast við at hjálpa kvinnum, ið hava fingið fosturtøku framda. Tey hava eina viðgerðarstovu, nevnd Tilflugten, har tey hjálpa kvinnunum at koma yvir sálarligu trupulleikarnar, ið standast av fosturtøkuni. Trupulleikar, eingin tosar um. Tey nevna tað : abortoverlever symdromet.*

*Mynd: Magnus Gunnarson*

– Tá ein kvinna verður við barn, og ikki ynskir tað, gerst barnið til ein trupulleika, sum hon ikki kann yvirskoða. Við at bjóða henni fosturtøku, bjóðar man seg til at taka trupulleikan frá henni. Og tað ljóðar gott. Men eingin fortelur kvinnuni um allar teir trupulleikarnar, sum koma aftaná, og sum hon fer at standa einsamøll við. Tað sigur Carl Sukkot, sum helt fyrilestur á fundinum hjá ProVita, 13 november.

Dagliga arbeiðir hann við at hjálpa kvinnum, sum eru komnar illa fyri av óvæntaðum fylgjum av fosturtøku, bæði sálarligum og kroppsligum.

## Ein ónd ringrás

Samfelagið er løgið samansett. Vit verða øll uppald við, at vit skulu gera so og so nógv. Megna so og so nógv. Fáa eina góða útbúgving, eitt gott starv og síggja væl út. Tað ljóðar gott, men tað elvir ógvuliga ofta til vánaligt sjálvsálit og skuldarkenslur, um vit ikki megna ella hava hug til at liva upp til settu fyritreytirnar. Tað sigur Carl Sukkot, sum í fleiri ár hevur gjørt eitt stórt arbeiði við at kunna um fylgjurnar av fosturtøku.

– Ein tann vanligasta orsøkin til at fosturtøkur verða framdar er ótryggleiki og vantandi sjálvsálit. Ein kvinna, ið júst er vorðin við barn vil altíð vera ótrygg, og hava nógvar hugsanir um hvat kann ganga galið. Um øll, sum tá eru rundanum hana eggja henni til at taka fostrið, er skjótt til, at hon bert fylgir »góðu« ráðunum. Er sjálvsálitið vánaligt, sær hon seg ikki føran fyri at hava barnið, um eingin annar væntar, at hon fer at megna tað, og eingin stuðlar henni, greiðir Carl frá. – Hon ger tað, tí hon av øðrum verður sannførd um, at tað er tað besta, sigur hann.

Carl greiðir frá um eina tílíka kvinnu, sum júst hevur verið í viðgerð hjá teimum. Drongur hennara var farin frá henni áðrenn hon varnaðist, at hon var við barn. Sjálvsálitið var ringt og hon fekk ongan stuðul, hvørki frá familju ella vinum. Øll bóðu hana hugsa um seg sjálva og útbúgvingina, sum hon var farin undir. Tí tað er so torført at vera einsamøll við einum barni. Og tí tók hon stigið.

Í fyrstuni kendi hon seg lættaða, men sum tíðin leið kom hon í eina svára sálarliga kreppu. Hon royndi fyrst at práta við familju og vinir um trupulleikan, sum hon hevði, orsakað av fosturtøkuni. Men eingin lurtaði. »Tú gjørdi tað einasta rætta«, var svarið hon fekk. Eisini tá hon fór til sálarfrøðing. Alt hetta gjørdi bara sjálvsálitið verri.

Carl greiðir frá, at tað, sum hon var fegnast um á viðgerðarstovninum var, at tey veruliga lurtaðu eftir henni. Tey skiltu sváru støðuna, sum hon var komin í. Tey søgdu henni, at tað var í lagi at syrgja og at spyrja spurningar. Hon hevði jú mist eitt barn.

– Tað er skeivt at »reklamera« við fosturtøku í litføgrum faldarum, sum einsíðugt greiða frá, at tað nærum er fylgjuleyst. Tað er skeivt, at lumpa ungu kvinnurnar, at tað bert er ein trupulleiki, sum skal fáast av vegnum, og sum tær síðani aldri merkja aftur. Tí tað eru altíð fylgjur av fosturtøku. Altíð. Men tað prátar man bara ikki um, staðfestir Carl Sukkot.

– Eg royni ikki at steðga fosturtøku ella at forbjóða tí við lóg, men eg haldi, at í dagsins samfelag verða fosturtøkur framdar undir skeivum fortreytum. Og tí royni eg at bøta um tað, við at geva kvinnunum upplýsingar um hvat ein fosturtøka inniber. Og vit geva neyðstøddu kvinnunum umsorgan og hjálp eftir fosturtøkuna, sigur hann. – Tær hava jú onga aðra staðni at venda sær.

## Nær er tað eitt barn?

Eitt argument, sum ofta hevur verið framført er tað, at barnið ikki verður til eitt barn fyrr enn eftir 12 vikur í móðurlívi, og at tað tí er í lagi at fremja fosturtøku inntil ta tíð. Carl Sukkot heldur, at argumentið er fullkomiliga burturvið.

– Hvør hevur funnið uppá hatta? Tí hatta er bert funnið uppá. Tú kanst ikki seta eitt mark. Nær er tað bert ein kykna og nær er tað lív? So skjótt sum tvær kyknur smelta saman undir gitingini, hevur tú ein eina sjálvstøðuga og sjálvsama gen-samanseting. Eitt einstakt menniskja. Lívið er ein prosess, sum byrjar við gitingini og endar við deyðanum. Hasar 12 vikurnar eru bara tilvildarliga ásettar, og tær kundu tað sama verið 4 vikur, 8 mánaðir ella 14 ár. Tað er eitt lív, sum verður steðgað, eitt menniskja, sum verður tikið, greiðir Carl Sukkot frá, og ger greitt, at hann heldur tað vera eitt fullkomiliga tápuligt argument.

Ein annar spurningur er, um ikki kvinnan hevur rætt at ráða yvir egnum kroppi. Til tað svarar Carl, at hon sjálvsagt hevur tað. Men tað eigur hon hugsa um, áðrenn hon gerst við barn. At hon ansar sær, og hugsar seg um. Og at hon hevur sjálvsálit til at siga nei, um tað er tað hon veruliga ynskir at siga. Samfelagið má eisini gerast betri til at stuðla henni í tí.

– Barnið er ikki ein partur av kroppinum hjá kvinnuni, hóast tað er inni í honum. Barnið hevur egna kromosomsamanseting, og er tí eitt sjálvstøðugt lív, sigur Carl.

## Broytið mannagongdina

– Eg veit, at fosturtøkur altíð fara at verða framdar. Men eg vil so fegin, at tað ikki verður gjørt við somu líkagleði, sum tað verður nú. Gev kvinnuni sjálvsálit, so hon torir at hugsa sjálv, og ikki letur seg ávirka av øðrum. Tí tað er jú hon sum skal liva við avgerðini altíð. Er fosturtøka tá framvegis ein møguleiki, lat hana so fáa alla ta neyðugu vitanina til, at hon kann viga fyrimunir og vansar upp ímóti hvørjum øðrum. Lat hana taka avgerðina. Velur hon tá framvegis fosturtøku, so stuðlað henni aftaná, og gev henni frið at taka avleiðingarnar. Lat hana syrgja og gráta, tí tað tørvar henni. Tástani vil eg meta, at vit hava fría fosturtøku, sigur Carl Sukkot at enda.

## FAKTA

- 3 vikur eftir at barnið er gitið, er hjartað farið at sláa.
- 6 vikur eftir at barnið er gitið, hevur tað fingið heila, eygu, oyru og munn.
- 10 vikur eftir at barnið er gitið, kennir tað ljós, ljóð, pínu og kulda.
- 9-11 vikur eftir at barnið er gitið, kann tað sutta tummil.
- Flestu fosturtøkur verða framdar ímillum 7-12 viku.
- Mest nýtti hátturin er útsúgvingarhátturin.
- Eftir 12 vikur veðrur aloftast ein sproyta givin, sum setur føðingina í gongd. Barnið verður tá føtt, aloftast deyðføtt.
- 60.000.000 fosturtøkur verða framdar árliga runt um í heiminum
- Harav eru umleið 60 í Føroyum
- 30% av kvinnum, ið fáa fosturtøku framda, fáa ymisk stig av sálarligum trupulleikum sum fylgju, t.d. angistneurosu
- Aðrar fylgjur kunnu verða lívssøri, trupulleikar við at gerast við barn seinni í lívinum og burðarslit.
- Pro vita merkir »fyri lívi«, og arbeiðir fyri at verja mannalív, heilt frá gitnaði til natúrligan deyða.
- Felagsskapurin er ikki heftur at nøkrum ávísum trúarbólki ella politiskum flokki.



# Almennur stovnur heldur starvsfólk fyri tað turra spott

**Seks stuðulsfólk hjá einum rørslutarnaður manni verða noydd at renna frá Peri til Poul fyri at fáa teir pengar, teir hava rætt til**

ALMENN FYRISITING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Hetta hevur verið eitt satt sirkus og vit verða hildin fyri tað turra spott av almennu fyrisitingini, sigur Gunhild Gaard*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

– Tað er nógv fyri at vera hildin fyri tað turra spott av einum almennum stovni.

Gunhild Gaard í Havn er mist ein stóran part av tí áliti, hon hevði á almennu fyrisitingina í Føroyum.

Óteljandi ferðir hevur ein almennur stovnur lovað at betala henni nakrar krónur, sum hon í langa tíð hevur átt til góðar.

Men higartil hevur tað verið til fánýtis.

Ístaðin fyri at betala peningin, verður Gunhild send frá starvsfólki til starvsfólk og frá Peri til Poul í almennu fyrisitinginí, tí tað er altíð onkur annar enn tann, hon hevur fingið fatur á, sum eigur at avgreiða málið.

– Eg føli meg rætt og slætt hildna fyri tað turra spott, tí her hendur onki, uttan at eg verðið drigin runt í einum almennum sirkussi, sigur hon.

## 20.000 krónur í buktini

Gunhild Gaard arbeiðir hjá Stuðulsfólkaskipanini fyri vaksin, sum er undir Heimarøktini og Serforsorgini.

Har er hon stuðul hjá einum ógvuliga rørslutarnaðum manni.

Í summar skuldi maðurin til Danmarkar til viðgerðar á sjúkrahúsi, men haðani var treytin, at hann skuldi hava hjálparfólk við sær, tí hann er so rørslutarnaður, at hann krevur røkt alt samdøgurið.

Sostatt fekk hann stuðul niður við sær. Tilsamans vóru vit seks stuðlar, sum skiftust um at verða niðri hjá honum, nakrar dagar ísenn.

Sjálv var Gunhild Gaard niðri hjá manninum í 10 dagar.

– Tá ið stuðlar arbeiða uttanfyri tænastustaðið, eiga teir dagpening, sum er 360 krónur um dagin og 200 krónur heimkomudagin.

– Sostatt eigi eg 3800 krónur í dagpengum fyri ferðina og tilsamans eiga allir teir seks stuðlarnir tilsamans einar 20.000 krónur í dagpeningi.

Sjálv fekk Gunhild Gaard fekk 1000 krónur í dagpengum frá Landssjúkrahúsinum og sostatt eigur hon 2800 krónur eftir í dagpengum, sum hon skal fáa frá stuðulsfólkaskipanini.

– Men tað er hesin dagpeningur, sum tað er heilt ómøguligt at fáa útgoldnan.

– Tann 7. september vóru allir seks stuðlarnir heimkomnir og dagin eftir fyltu vit pappírini út í sambandi við dagpeningin og avleveraðu tey á stuðulsfólkaskipanini dagin eftir tann 9.september.

## Sirkussið byrjar

Gunhild Gaard sigur, at tá er tað at sirkussið byrjar.

– Fyrst fekk eg fatur einum starvsfólki, sum hevði beint málið víðari til eitt annað starvsfólk, sum hevði beint málið víðari til eitt annað starvsfólk, sum aftur hevur beint málið víðari til eitt heilt annað starvsfólk.....

– Frá hesum seinasta starvsfólkinum fekk eg so kortini eitt greitt svar og tað var, at hon hevði so nógv at gera í sambandi við fíggjarlógini, at hon hevði ikki stundir at taka sær av dagpeningamálinum fyrrenn um 14 dagar.

– Tað var í øllum førum eitt greitt svar og so visti eg tað.

– Men tá ið 14 dagar eru gott og væl farnir og ongin peningur framvegis er útgoldin, ringi eg aftur til hetta seinasta starvsfólki, sum hevði biðið meg bíða í 14 dagar. Hetta starvsfólki segði nú, at nú hevði hon verið í sambandi við fíggjarmálaráðið, sum hevði boðað frá, at peningurin skuldi útgjaldast.

Men tað var altso ikki hon, sum skuldi gjalda peningin út, so hon hevði sent málið aftur, haðani tað upprunaliga var komið

Gunhild Gaard sigur, at so var onki at gera uttan at byrja alla mylluna umaftur!

Og so varð farið á Stuðulsfólkaskipanina einaferð afturat.

Men nei!

Nú var akkurát tann sjúk, sum skuldi avgreiða málið og tað var onki annað starvsfólk, sum kundi avgreiða tað.

Nakrar dagar seinni er hendan blivin frísk aftur og tá ringir hon aftur og sigur, at hon varð noydd at senda málið víðari til eina, sum ananrs eisini hevði havt málið einaferð fyrr, men sum somuleiðis hevði beint tað víðari.....

– Eg fekk so aftur fatur á fólkinum, sum hevði málið og hon lovaði at brúka alla sína orku uppá at avgreiða málið.

Einar tveir dagar seinni lovaði hon at peningurin skuldi verða útgoldin dagin eftir.

Men eina lítla viku seinni var framvegis onki hent.

So aftur í telefonina og einaferð enn lovaðu tey, at nú skuldi tað vera.

Men enn er so onki het!

## Almenn umsiting má vera dýr

Gunhild Gaard sigur, at er hetta eitt typiskt dømi um okkara almennu umsiting, er onki at siga til, at hon er dýr, tí hetta málið átti at verið so einfalt, sum tað yvirhøvur kann vera. Tí torir nóg illa at hugsa sær skilið, táið okkurt fløkt mál er til viðgerðar.

– Hóast eitt starvsfólk hevur lovað at brúka alla sína orku uppá tað, hevur fyrisitingin ikki enn megnað at avgreitt eitt rættiliga einfalt mál um dagpening, so eg veit ikki, hvussu verður, tá ið okkurt ordiligt er á vási, sigur Gunhild Gaard.

Hon sigur, at tað er ikki lítið, hon hevur brúkt at tíð og telefon fyri at fáa hendur á dagpenininginum.

– Feilurin er kanska, at tey vita ikki, hvørjum kassa peningurin skal betalast úr. Men tað kunnu vit ikki svíða fyri. Tilsamans er kanska talan um 20.000 krónur, sum hesir seks stuðlarnir eiga í dagpengum og tað má almennna fyristingin hava rygg til at rinda, so kunnu tey aftaná finna útav, hvør kassi skal betala, sigur Gunhild Gaard.

Hon sigur, at hon hevur fyrr verið av landinum í slíkum ørindum og tá hava ongir trupulleikar verið við dagpeningi. Men tá var tað Almannastovan,sum umsat økið.

Men nú tey eru komin undir stuðulsfólkaskipanini, vísir tað seg at vera heilt ómøguligt at finna útav tí.

Og hon leggur afturat, at sum støðan er nú, fer hon at hugsa seg fleiri ferður um, áðrenn hon einaferð afturat átekur sær eina slíka uppgávu fyri ein rørslutarnaðan.

– Hetta er so langt úti, at tað átti ikki at komið fyri. Hjá tí almenna er talan um piparnøtur, men hjá okkum er tað als ikki týdningarleyst og tá ið vit høvdu fylt pappírini út, væntaðu vit, at hetta var ikki annað enn eitt avgreiðslumál, sigur Gunhild Gaard at enda.

## Skulu hava sínar pengar

Leiðarin á Stuðulsfólkaskipanini fyri vaksin, Regin Johansen, er á skeið hesar dagarnar, so haðani fekst ongin viðmerking.

Mary í Garði, sum er leiðari á Heimarøktini og Serforsorgini, sigur, at tað er ongin ivi um, at hesi fólkini eiga rætt til dagpeening.

Men tað er altíð tann einstaki stovnsleiðarin, sum skal avgreiða slík mál, altso í hesum føri leiðarin á Stuðulsfólkaskipanini fyri vaksin.

Men hon sigur, at viðhvørt kann tað vera eitt ivamál um, hvørjum kassa ein samsýning skal rindast.

– Men í slíkum føri er mannagongdin tann, at starvsfólkið skal í øllum førum hava sín pening beinanvegin og so mugu teir ymsu kassarnir aftaná finna útav aftaná, hvør av teimum tað er, sum eigur útreiðsluna, sigur Mary í Garði.